# Nú er fast

**Tey tóku tað í álvara á Ellisheiminum í Vágum. Tað kongaliga brúdleypið. Flaggið í húnar hátt og fólk í pussinum savnaðist í samkomuhøllini, har tey sum undir lestri sótu og fylgdu gongdini á stórskíggja. Tá so ringarnir vóru komnir á fingrarnar á brúðarparinum, lætnaði spenningurin eitt sindur, tí nú var fast**

KONGALIGT BRÚDLEYP

*Orð: Edvard Joensen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Tað var sera hátíðarligt og eisini álvarsligt, hetta at fáa krúnprinsin væl giftan. Fólk livdu við og viðhvørt mátti eygað turkast eitt sindur*



*Fleiri avvarðandi vóru eisini komin at vera saman við búfólkunum á Ellisheiminum hesa hugnaligu løtuna, meðan tey vóru í kongaligum brúdleypi*

**Miðvági:** Tað var stórhending hjá búfólkunum á Ellis- og avlamisheiminum í Miðvági, at krúnprinsurin og Mary Donaldson vórðu gift. Tey vóru savnað um stórt kaffiborð í samkomuhøllini, har tey á stórskíggja fylgdu brúdleypinum frá klokkan tvey og langt út á seinnapartin. Men einki var endaligt, fyrr enn ringarnir vóru komnir upp á pláss. Tá var fast.

Tey fylgdu ikki bara við í sjónvarpi. Nei, tey VÓRU við í brúdleypinum. Eigin ivi um tað. Hetta var alvorligt.

Tað er ikki á hvørjum degi, at slíkt hendir, hóast onkur var, sum mintist, tá abbin og omman, Fríðrikur IX og Ingrid, vórðu gift, fyri ikki at tala um foreldrini, Margrethu og Heindrik.

– Tað er so stutt síðan sum í gjár. Tað er einki at snakka um.

Jú, tey luttóku. Byrjaðu við at syngja fyrsta ørindi úr kenda brúðarsálminum, »So hugnaligt og so fagurt er«. Á føroyskum. Og tá hann so varð sungin aftur í kirkjuni á donskum, var onkur, sum tók blaðið fram aftur og sang við.

Starvsfólkið á heiminum hevði gjørt nógv burtur úr degnum, sum byrjaði við einum góðum døgurða á middegi, har pyntað varð sum til brúdleyps. Bæði veggir og borð vóru skrýdd, sum skuldi brúðarparið komið á vitjan.

Síðan varð farið niður undir í samkomuhøllina, har tað stóra ballið var. Stórt kaffiborð við lagkøkum og øðrum køkum aftuvið. Onkur avvarðandi var eisini stokkin inn á gólvið at fylgja við hesi hátíðarløtu.

Og so sótu tey har øll og gjørdu viðmerkingar til hendan og handan. Kendu fleiri. Bæði kongalig og onnur, sum sóust á stórskíggjanum.

Onkur hevði hug at tára soleiðis av og á. Hetta var heilt hátíðaligt, og týdningarmikið eisini. Spenningurin vaks, so hvørt nærkaðist tíðini, at brúðurin skuldi koma í kirkju. Og tá brúðgómurin stóð og andaði djúpt, og eyguni ikki kláraðu at rúma vætuni, tá stóð nógv á hjá summum, sum komin vóru í brúdleyp í Miðvági.

Men allur spenningurin varð forloystur, tá biskupur var liðugur við sína vígslu, og ringarnir vóru ásettir. Tá helt onkur av búfólkunum bæði hart og hjartaliga fyri, at:

»Nú er fast«.

Og so var bara veitsla eftir. Alt tað álvarsliga var avgreitt í øllum góðum, og so var bara eftir at gleðast saman við teimum báðum, sum í opnum vogni koyrdu gjøgnum gøturnar í Keypmannahavn.

»Áh, hvat eru tey ikki fitt. Áh so »yndig« hon er«, tosaðu tey og høvdu tað sum í brúdleypi. Gleddu seg, til donsku vikubløðni fara at koma aftur. So verður lisið, klipt út og hongt á veggin. Tað var eingin ivi um tað.




## HVØNN VEG SKAL EG FARA?

**Byrja yrkisleiðina í Sparikassanum**

Næmingar í Føroya Sparikassa fáa ein avbera góðan møguleika at skapa sær eina yrkisleið við góðum framtíðarmøguleikum. Júst nú sóknast Sparikassin eftir næmingum. Næmingarnir, vit nú leita eftir, skulu arbeiða í Suðurstreymi og Eysturoy.

Sum næmingur í Sparikassanum fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit sóknast eftir einum lívligum og óhátíðarligum persóni, sum er ein eldhugaður bólkaspælari við kensluni av, at sjálvsábyrgd og góð tillagingarevni skapa íblástur.

Í okkara arbeiðsumhvørvi er týðandi, at bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast. Vit leggja eisini dent á opið og ærligt prátingarlag, ið mennir ein felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Við útbúgving úr Føroya Sparikassa fært tú eisini førleika at starvast innan aðrar vinnur. Ella tú brúkar útbúgvingina sum lopfjøl til víðari útbúgving. Tó stremba vit sjálvandi eftir, at tú framhaldandi vilt vera á okkara liði, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Sparikassin hevur eisini fleiri góð tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

Í næmingatíðini ert tú við í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tel 348510 ella á telduposti marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Send umsókn við avriti av próvskjølum til adressuna niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. mai 2004.

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI






*Tað stóð nógv á ta løtuna, prinsarnir høvdu hug at lippa......*



*.....men nú er lætnað hjá krúnprinsinum, og so er høvuðsfjeppari hansara á Ellisheiminum í Vágum eisini í góðum hýri*



*Pyntað var við hjørtum í ymsum litum, eins og eisini rósur og aðrar blómur vóru at síggja á Ellis- og avlamisheiminum í Vágum til krúnprinsabrúdleypið*

## Røðan hjá Fríðrikki krúnprinsi til brúður sína

**Fríðrikkur krúnprinsur helt eina romantiska og ikki sørt poetiska røðu fyri brúður síni og helminginum av danska fólkinum, sum sat rúnabundin frammanfyri sjónvarpsskíggjunum. Vit prenta her røðuna hjá krúnprinsinum**



*Kære Mary,*

*I år 2000 i Sydney forenedes de 5 OL-ringe for 25. gang. Australien var for mig et ukendt og uudforsket kontinent, som bl.a. symboliseres i den femte og nederste olympiske ring.*

*Jeg befandt mig på ukendt land blandt glade og feststemte fremmede. Min eneste bagage var på daværende tidspunkt mine høje forventninger til mit ophold samt en vis portion selvtillid.*

*Næsten 200 år tidligere var en anden dansker ved navn Jørgen Jürgensen ankommet under andre forhold, men ligeledes med stor forventning og selvtillid. Han forlod dog hurtigt Sydney og sejlede til Tasmanien - dit land - en stat i Australien.*

*Her skabte han sig et rygte, som endte med at tage livet af ham.*

*Jeg var kun to dage gammel i Australien, og vores skæbne var beseglet. Dog stadig ubevidst for os begge, men den udstråling, du har, skinnede klart og stærkt for mig fra vores første møde. Siden da er jeg blevet forblændet og afhængig af den.*

*Mit liv var indtil da en stræben efter at skabe en større selvstændighed, uden at indskrænke mit råderum. Mine muligheder var store, og min verden ofte ensom. Men begge dele styrkedes til stadighed i tid og rum, fordi min nysgerrighed og positive tro på det endegyldige drev mit værk frem.*

*Så rejste du ind i min verden, og meget er allerede hændt. Nu er her to verdener - ja sandsynligvis flere; det er dem, vi nu skal udforske sammen side om side. I lys og i mørke, sommer, efterår, vinter, forår - altid.*

*Den glæde og styrke, du giver mig, er som solen i dagtimerne, der med sit skær slår al tvivl og mørke i jorden. Og som månen i natten lyser du, vågende med et fagert skær af mildhed, som fratager mørkets symboler deres drillende og indbildske spillerum.*

*Jeg vælger ofte at opfatte lyset fra en ny dag som det uberørte, uerfarnes og uskyldiges genfødsel. Måske lidt naivt - alligevel er det skønt at lege, at alting begynder på ny. En ny verden fødes igen med lyset fra den nye dag.*

*Dette øjeblik er "os" to – nye sammen, unge sammen, uskyldige sammen, forelskede sammen – bare sammen. Du giver mig tryghed, glæde og lykke.*

*Jeg er nærmest ved at boble over af spørgelyst på, hvad den nærmeste og fjerneste fremtid vil bringe for os - og det er dig, der skal svare. Men jeg skal nok prøve på at styre mig, for to spørgsmål er jo allerede besvaret med et ja af os begge to. Det er svar, som vil gælde for os for altid - og behøver vi lys i vores søgen på svar, kræver det blot, at vi hæver blikket og kigger op mod himmelen. Der ligger evigheden, der tillige kan vise os vejen, der til tider bliver væk.*

*Jeg elsker dig Mary - kom lad os gå, kom lad os se - gennem tusind verdener venter vægtløs kærlighed.*

*Deres Majestæter, Deres Kongelige Højheder,*

*Må jeg bede alle rejse sig, og med mig udbringe en skål for min brud.*